# NORRÖNU HARMONIKU FAGNAÐUR 2000

**21.–23. august**

## Luttøkufráboðan

*Navn á bólki:* ______________________

| | | | |
|---|---|---|---|
| *Navn:* | ______________ | *Ljóðføri:* | ______________ |
| *Navn:* | ______________ | *Ljóðføri:* | ______________ |
| *Navn:* | ______________ | *Ljóðføri:* | ______________ |
| *Navn* | ______________ | *Ljóðføri:* | ______________ |
| *Navn:* | ______________ | *Ljóðføri:* | ______________ |
| *Navn:* | ______________ | *Ljóðføri:* | ______________ |
| *Navn:* | ______________ | *Ljóðføri:* | ______________ |
| *Umboðs-m/k:* | ______________ | *Tlf. heima:* | ______________ |
| *Bústaður:* | ______________ | *Tlf. arb.:* | ______________ |

*Vit ynskja at spæla undirhaldstónleik í cocktailbarrini* ☐

*Vit ynskja at spæla til dans í náttklubbanum* ☐

Um ætlanin er at spæla í cocktailbarrini, skal viðmerkjast her, hvønn serligan stíl ætlanin er at spæla: ***Dømi: Latínamerikanskur, skotskur, føroyskur, Jularbo, Taube e.l.***

**Stílur:** ______________________

***Fráboðanin um luttøku skal í seinasta lagi 12. aug. 2000 sendast til:***

**NORRÖNA HARMONIKU FAGNAÐUR**

***Postsmoga 1192 - FO 110 Tórshavn***

**Meira fæst at vita við at ringja til Paula Jacobsen, tlf. 317216 ella Fimmboða Lisberg, tlf. 310552**


# Jazz Buffét

## á Restaurant Hafnia

**mikudagin 9. aug., hósdagin 10. aug., fríggjadagin 11. aug., leygardagin 12. aug. & sunnudagin 13. aug.**

**frá kl. 18.00**

**STÓRT ÚRVAL AV YMISKUM RÆTTUM.**

**Etið av øllum - so nógv tygum orka, t.d.**

**KALT:**
3 sløg av sild
Dampaður laksur
Skeljadjórasalat
Royktur laksur
Lakað skeljadjórabland
Stórt úrval av salatum
Úrval av pasta

**HEITT:**
Heilstokt lambskjøt
Heilstokt glaserað bein-skinka
Heilstoktur neytaháryggur
Barbeque spareribs
"Cajun" høsnarungar
Creol scampi
Rísrættur við urtum og chili

**OMANÁ:**
Osta-køka
Rabarbu-køka
Brownies

**AFTURVIÐ:**
Heimabakað franskbreyð og bollar

Etið so mikið tygum orka, fyri BERT...

*175,-*

Bíleggið borð frammanundan á tel 31 32 33

HOTEL HAFNIA

Hotellið í miðbýnum
Tel 31 32 33


# Rentubroyting

Vi› gildi frá 01. august 2000 hækka›i SU‹UROYAR SPARIKASSI rentustigini. Eftir rentuhækkingina eru høvu›srentustigini nú:

| **INNLÁN** | % p.a. |
|---|---|
| Vanlig konto | 0,25 |
| 3 m›r. uppsøgn | 3,50 |
| 12 m›r. uppsøgn | 4,00 |
| Ábyrgdarkonto | 4,75 |
| Odda-konto | 4,75 |
| Bústa›arkonto | 3,75 |
| + rentustudning | 3,00 |
| Luta- og kapitaleftirløn | 6,00 |
| **ÚTLÁN** | |
| Sethúsalán 1. ve›r. - seriulán | 6,50 |
| Sethúsalán 1. ve›r. - annuitetlán | 6,50 |
| Sethúsalán 2. ve›r. - seriulán | 8,25 |
| Sethúsalán 2. ve›r. - annuitetlán | 8,25 |

SUÐUROYAR SPARIKASSI

# *Halt* sosialin

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett ni›anfyri standandi partafelag:**

**Skrásetingar-nr.** P/F 3056

**Navn:** P/F FarIta
**Adressa:** 440 Haldarsvík

**Kommuna:** Haldórsvíkar Kommuna
**Stovningardato:** 31.07.2000
**Vi›tøkudato:** 31.07.2000
**Kapitalur:** Kr. 3.000.000,00
**Inngjaldingarháttur:** : Kontant kr. 3.000.000,00 til kurs 100.
**Stovnarar:** P/F Far-Trade, 460 Nor›skála og P/F Vest-Trading, Mi›alsbrekka, 350 Vestmanna.
**Nevnd:** Bjørn á Heygum, R. C. Effersøesgøta 5, 100 Tórshavn (forma›ur), Hjørleif Dahl, 460 Nor›skála og Háldan H. Haldansen, Mi›alsbrekka, 350 Vestmanna.
**Stjórn:** Hjørleif Dahl, 460 Nor›skála.
**Tekningarreglur:** Felagi› ver›ur tekna› av stjóranum ella av allari nevndini í felag.
**Grannsko›ari:** : P/F Rasmussen & weihe, á Gla›sheyggi, 100 Tórshavn.
**Roknskaparár:** 01.01. - 31.12
**Fyrsta roknskaparár:** 31.07.2000 - 31.12.2001
**Endamál:** Endamál felagsins er at reka fiskavirki›, harundir keyp, sølu, framlei›slu og gó›sking av fiski og fiskaúrdráttum, umframt handil og umbo›an og anna› starv í hesum sambandi.

Skráseting Føroya tann 7. august 2000

Kristin Balle


**Trygdarútgerð til øll endamál!**

- Verndarhjálmar og húgvur
- Hoyrivernd v/FM radio
- Brillur
- Maskur
- Trygdarskógvar
- Fallsikringar
- Handskar
- Hondreins
- Vit útvega skiltir til **øll** endamál!

**Vit taka okkum av øllum uppgávum innan arbeiðaravernd**

*Tosið við okkum!*

**Kaj Andreasen & Co**
Sandvíkarhjalli
Tel. 315600 - Fax 318008

Sosialurin - 311820




# Starvsmannafelagið átalar formansskapin í løgtinginum

*Starvsmannafelagið heldur tað vera skelkandi, at formansskapurin í løgtinginum ikki átalar álop á fólk og stovnar*

EYÐUN KLAKSTEIN

Tingviðgerðin av løgmansrøðuni hevur nú fingið Starvsmannafelagið at senda løgtingsformanninum skriv.

Í hesum skrivi finst fakfelagið at formansskapinum í tinginum, tí hann ikki átalar tingmenn, tá teir missa tamarhald á sær sjálvum og loypa á fólk og stovnar, sum ikki hava møguleikan at svara aftur.

Tað, sum Starvsmannafelagið serliga sipar til, er, at formaðurin í fíggjarnevndini hjá løgtinginum, Bjarni Djurholm, var so misnøgdur við eina tíðindasending hjá Sjónvarpi Føroya, at hann legði tey undir at vera partísk og at snúgva veruleikanum.

– Sum krúnan á verkinum hótti formaðurin í fíggjarnevndini SvF og harvið eisini tíðndafólkini, at nú var tolið uppi, og at nú var endi á vælvildini frá løtinginum mótvegis hesum »almenna tíðindastovni, sigur Starvsmannafelagið í skrivinum til løgtingið, og sigur seg vera skelkað av hesum.

### Gáloysni ella líkasæla

– Her var gjørt eitt so grovt og niðursetandi álop á ein stovn og tíðndafólk, at orð eru ikki fyri hesum. Hesi skelkandi og órógvandi orð frá løgtingsins røðarapalli sluppu at standa eftir, uttan at hetta við einum einasta orði varð átalað av formansskapinum, sigur Starvsmannafelagið.

Gunnleivur Dalsgarð, formaður í Starvsmannafelagnum, hevur undirskrivað brævið, og hann spyr tingformannin, um talan er um gáloysni ella líkasælu frá formansskapinum.

– Tað skorar annars ikki upp á átalur, tá løgtingsfólk ikki nýta røttu nøvnini og eftirnøvnini mótvegis hvørjum øðrum, ella tá okkurt illavorðið verður sagt um løgtingsfólk sjálvi, sigur Starvsmannafelagið.



*Hans Pauli Strøm, tingmaður, heldur, at tørvur er á einum brúkararáð í Føroyum, tí Kappingarráðið klárar ikki nóg væl at røkja áhugamálini hjá brúkarunum. Mynd: Álvur Haraldsen*

# Stórur tørvur á einum brúkararáð í Føroyum

*Tað er alneyðugt við einum brúkararáð, sum kan røkja áhugamálini hjá brúkarunum, heldur Hans Pauli Strøm, løgtingsmaður*

EYÐUN KLAKSTEIN

Hans Pauli Strøm, løgtingsmaður fyri Javnaðarflokkin, heldur, at tað er alneyðugt við einum brúkararáð í Føroyum.

– Í løtuni hava vit eitt Kappingarráð, sum sigst skula tryggja brúkaran, men soleiðis er tað ikki. Áhugamálini hjá brúkarunum eru nógv fleiri enn tey, sum Kappingarráðið kann hjálpa við, sigur Hans Pauli Strøm.

Tí mælir hann til, at eitt alment brúkararáð verður stovnað í Føroyum, men hann ætlar sær ikki sjálvur at koma brestandi við einum uppskoti, sum hann tekur til.

– Ofta verða uppskot hjá andstøðuni bara skúgvað til viks, og tað vil eg ikki skal henda í hesum máli. Heldur vóni eg, at fólk og politikarar taka undir við einum brúkararáð, so vit fáa eitt slíkt innan ov langa tíð, sigur hann.

### Tryggja góðsku

Í øllum okkara grannalondum er eitt brúkararáð, sum heldur eyguni við tænastum og vørum, sum fólk keypa. Fólk kunnu venda sær til hetta ráð við kærum, og ofta tekur ráðið mál upp av sínum eintingum.

Í Danmark hevur brúkaraumboðsmaðurin tikið nógv tøk fyri brúkaran, millum annað á teleøkinum, har fólk ofta eru misnøgd.

– Eitt brúkararáð í Føroyum eigur at hava til uppgávu at ansa eftir góðskuni á teimum vørum og tænstum, sum verða boðin út, og brúkararáðið skal eisini tryggjað eitt ávíst útboð og nøktandi merking av vørum, heldur Hans Pauli Strøm.

### Ikki bara kapping

Fyri trimum árum síðani var tað táverandi Príseftirlitið og Prísráðið avtikið, tí tað var hildið betri við einum Kappingarráði, sum skuldi virka eftir eini nýggjari kappingarlóg.

Kappingarráðið skal tryggja javna kapping millum øll tey, sum selja tænastur og vørur, og hetta kemur eisini brúkarunum til góðar.

– Men tað er ikki nóg mikið við einum kappingarráði. Tørvur er á einum brúkararáð, sum nógv betur kann røkja áhugamálini hjá brúkarunum, sigur Hans Pauli Strøm.

– Einstøk fólk ella brúkarafeløg megna lítið í brúkaramálum, um tað ikki eisini er ein almennur stovnur at venda sær til, og sum viðgera málini, heldur hann.

# Varin við útbjóðingum í samferðsluni

*Finnbogi Arge, landsstýrismaður, ynskir sær møguleikan fyri útbjóðingum í samferðsluni*

EYÐUN KLAKSTEIN

Hóast útbjóðingar á samferðsluøkinum ikki eru eins aktuellar, sum tá Skálafjarðaleiðin varð niðurløgd, ynskir landsstýrismaðurin við samferðslumálum sær møguleikan at útbjóða farleiðir.

Sambært løgmansrøðuni ætlar Vinnumálastýrið í ár at leggja eitt uppskot fyri tingið um løgtingslóg um útbjóðingar á samferðsluøkinum, men Finnbogi Arge sigur, at tað er ein treyt fyri hesum, at samgonguflokkarnir gerast samdir um tað.

### Serliga á Skálafjørðinum

Hann hevur roynt at fáa undirtøku fyri hesum uppskoti, men er ikki komin á mál.

– Útbjóðing av eini farleið var serliga upp á tal, tá Skálafjarðasiglingin lá still. Nú hevur Strandferðslan tikið hesa sigling uppaftur, og ætlanin er at royna eitt skjóttgangandi skip á hesi leið, so har hendir ikki meira við útbjóðing beint nú, sigur Finnbogi Arge.

### Borgarin í miðdeplinum

Landsstýrismaðurin sigur, at tað er altavgerandi, at borgarin fær ein fyrimun, um tað almenna útbjóðar farleiðir.

– Vit skulu hugsa um prís og tænastu, og tað skulu sjálvandi setast greiðar treytir til tey, sum hava hug at røkja eina farleið, sigur Finnbogi Arge.

Tá útbjóðingin av Skálafjarðasiglingini var frammi, var ætlanin, at Strandfaraskip Landsins skuldu umsita útbjóðingina, og hetta heldur Finnbogi Arge framvegis er eitt gott hugskot.



*Tað er altavgerandi, at tað er ein fyrimunur fyri borgaran, um farleiðir verða útbjóðaðar, sigur Finnbogi Arge, landsstýrismaður*